TÓRSHAVNAR
KOMMUNA

Skúlin og Frítíðarskúlin á Argjahamri

Tórshavn, 6. november 2017

**Viðv. standinum á skúlabygninginum á Argjahamri**

Fyrr í ár hevur verið alment frammi um standin á skúlabygninginum á Argjahamri. Tórshavnar kommuna skal við hesum kunna um viðurskiftini.

Bygningurin, ið hýsir skúla, frítíðarskúla, umframt ítrótta- og frítíðarvirksemi, varð tikin í nýtslu í og 2011 er uml. 7.200 m2.

Í sambandi við gerð av nýggju/útbygdu høllini á Argjahamri varð staðfest, at ávísur soppakendur vøkstur var í útvegginum/klæðingini vestureftir við høllina og í samankomingini við takið. Harumframt var staðfest í sambandi við 5 ára eftirlitið av bygninginum í 2016, at ávísir uttandura bygningslutir (takið, vindeygu og klæðing) ikki allastaðni tóktust vera í eins góðum standi, sum væntast kundi, og varð tí málið m.a. tikið upp við høvuðsarbeiðstakaran, ið bygdi bygningin, og ráðgevan.

Á sumri 2016 vórðu gjørdar innleiðandi kanningar, ið staðfestu, at í nøkrum støðum eru vindpláturnar í útvegginum vátar innanfyri klæðingina. Í summum førum er talan um klæðing móti betongi og í øðrum føri móti timbri.

Í verandi støðu ber ikki til at siga, hvussu umfatandi skaðin er. Í næstum verður sýn og meting í málinum. Staðfestu skaðarnir eru á vindpláturnar, ið eru uttanfyri dampsperruna, og eigur hetta tí ikki at ávirka klimaði í bygninginum. Tó er longu greitt, at fleiri vindeygu á suður- og eystursíðuni vera skift fyrst í komandi ári.

Húsaumsitingin hjá Tórshavnar Kommunu, ið varðar av skúlabygninginum á Argjahamri, fylgir málinum víðari saman við Mentamáladeildini, ið varðar av skúla- og ítróttavirkseminum og Barna- og ungdómsdeildini, ið varðar av frítíðarskúlavirkseminum.

Kunnað verður aftur, tá nærri upplýsingar eru!

Eru spurningar ber til at venda sær til leiðslurnar á staðnum, og í øðrum lagi:
Unn Sørinardóttir Perdomo, leiðara á Húsaumsitingini, unnp@torshavn.fo og
Sigurð Ó. Vang, mentamálaleiðara, sigurd@torshavn.fo